

Betri P/F

# **Betri** samfelagstilvit 2020

Frágreiðing um CSR-virksemi samtaksins

Saman eru
vit betri

# Hvønn mun gera vit?

Tað er serliga ein spurningur, sum eg í seinastuni ofta havi svarað uppá:

»Hví skulu vit í einum lítlum landi, sum Føroyum, leggja okkum eftir einum burðardyggum, grønum og rættvísum atburði, tá ið tað í stóru heimsmyndini ikki ger stórvegis mun?«

Fyri meg er svarið einfalt: Tað skulu vit, tí øll broyting byrjar við einstøkum gerðum. Tað, tú gert. Tað, eg geri. Samanlagt gera smáu gerðirnar stóran mun. Og Betri samtakið, sum er ein stórur aktørur í føroyska samfelagnum, bæði vil og skal gera mun.

Bæði í tí smáa, tá vit dagliga leggja okkum eftir at veita einstaka kundanum ábyrgdarfulla tænastu og ráðgeving á øllum virkisøkjum. Hartil í breiðari høpi, tá vit veita stuðul, ið á ymsan hátt ger gagn í føroyska samfelagnum. Og at enda eisini í heimshøpi. Vit eru øll partur av sama heimi, og tí hava vit orðað ein framsøknan CSR-politikk fyri alt samtakið við útgangsstøði í heimsmálunum hjá ST.

## Undantaksárið 2020

Í fjør sóu vit, hvussu samanknýttur heimurin er, og hvussu stóra ábyrgd vit hava hvør fyri øðrum. Á grækarismessu mátti alt endurskoðast. Ivamálini vóru mong, men svarini vóru fá. Vinnan fekk ein hvøkk. Húsarhaldið varð skelkað. Vánirnar vóru daprar, men bara mánaðir seinni kom ferð á aftur.

Heldur enn at fara í panikk slógu føroyingar kalt vatn í blóðið og tóku skilagóðar fíggjarligar avgerðir. Vit tillagaðu okkum øll, og ráðgeving og fundarvirksemi varð flutt á netið. Og hesa tíðina gjørdist sambandið við føroysku veitararnar uppaftur tættari. Vit keyptu minni uttan úr heimi og brúktu í staðin lokal tilboð. Tí líktust Føroyar skjótt sær sjálvum aftur.

## Javnstøða

Tí hóast landið er lítið, eru førleikarnir her bæði nógvir og góðir. Í Betri samtakinum miða vit eftir at gagnnýta allar førleikar, so at arbeiðsplássið verður dynamiskt og trivnaðurin góður. Tí er javnstøða eitt greitt mál, og í dag eru kynini javnt umboðað í Betri. Hetta er ikki úrslit av positivari munagerð, men heldur tí at starvsfólkið verður sett eftir førleikum.



*Evy Jacobsen, forstjóri*

## Betri stuðul

Eitt annað greitt mál, sum vit hava - og sum eisini er ásett í viðtøkunum - er at lata part av vinninginum aftur til samfelagið. Vit eru tilvitað um ábyrgdina, vit sum stórur aktørur hava her á landi, og vit eru tilvitað um, at tað jú er kundin í Betri Trygging, sum eigur Betri. Tí læt Betri Stuðulsgrunnurin í 2020 stuðul fyri 15,3 milliónir kr kring alt landið. Hesum eru bæði vit og kundarnir errin av, tí tørvurin á stuðli er stórur og virkisfýsnið stórt.

Í hesi frágreiðing verður kavað niður í farna árið í CSR-høpi. Vit lýsa her partar av hesum virkseminum, og hvussu vit nýta CSR-politikkin til at gerast betri. Bæði saman við kundunum, starvsfólkunum og eldsálum kring landið.

Tí saman eru vit betri.



Evy Jacobsen, forstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| Betri lyklatøl | 5 |
| CSR Politikkurin hjá Betri | 6 |
| Heimsmálini | 7 |

## Viðskiftafólk

| | |
|---|---|
| Betri hjálpti kundunum, tá korona kom | 8 |
| Bústaðarfígging kring alt landið | 9 |
| Orkulán | 10 |
| Sethúsatryggingin gjørdist umhvørvisvinalig | 10 |
| Grønt billán | 11 |
| Ferðast trygt í Føroyum | 12 |
| Viðskiftafólkini eru nøgd | 13 |
| Betri Pensjón tryggjar javnstøðu | 14 |
| Burðardyggar íløgur | 14 |

## Starvsfólk

| | |
|---|---|
| Starvsfólk gjørdu Betri grønari | 15 |
| Betri starvsfólkatrivnaður | 16 |
| Javnstøða í samtakinum | 18 |

## Samfelag

| | |
|---|---|
| Umboðsráðsval 2020 | 19 |
| Betri Stuðulsgrunnurin læt góðar 15 mió. kr. í 2020 | 20 |
| Adventsgávur og stórfingin gáva til Sjúklingahotellið Tórshavn | 21 |
| Ein hjálpandi hond til sjúkrahúsverkið | 22 |
| Parkinsonfelagið: – Nú fáa vit hugsavnað okkum um kunningina | 23 |
| Stóra innsavningin til Reyða Kross | 24 |
| Høvuðsstuðul hjá samarittunum | 25 |
| Bjargingarvestar til tjóðarítróttina | 26 |
| Betri stuðlar fótbóltinum kring landið | 27 |
| Fólkaskúlakapping um burðardygd | 28 |
| Renn fyri lívi | 29 |
| Føroysk gransking í miðdepilin | 29 |
| Betri Ferðslutrygd | 30 |

# Betri lyklatøl 2020

| | |
|---|---|
| **Solvensur og kapitalur** | |
| Solvensprosent | 33,7% |
| **Vinningur** | |
| Rentan av eginogn áðrenn skatt | 5,1% |
| Rentan av eginogn eftir skatt | 4,3% |
| Inntøka pr. útreiðslukrónu | 1,5 |
| Útlán í mun til innlán | 80,7% |
| **Lánsváði** | |
| Tap og niðurskrivingar í tíðarskeiðinum í prosentum | 0,3% |
| Útlán í mun til eginognina | 1,9 |
| Útlánsvøkstur | 2,0% |

## Í stuttum

- Úrslitið aftaná skatt vísir eitt avlop á 146,3 mió. kr.
- Úrslitið áðrenn skatt er 171,5 mió. kr.
- Útlán hjá samtakinum eru 6.420 mió. kr.
- Samtakið hevur lánsbrøv fyri 3.955 mió. kr
- Ogn knýtt at tryggingarsáttmálum fyri 1.741 mió. kr
- Innlán hjá samtakinum eru 7.957 mió. kr.
- Skuld knýtt at tryggingarsáttmálum fyri 2.164 mió. kr.
- Eginogn á 3.458 mió. kr.
- Úrslitið fyri 2021 aftaná skatt fer væntandi at liggja millum 80-120 mió. kr.



# CSR Politikkurin hjá Betri

**Betri samtakið er største fíggjarsamtak í Føroyum, og við hesum fylgir stór ábyrgd, sum verður tikin í størsta álvara. Partar av samtakinum hava røtur aftur til 1832 og hava virkað fyri tryggleika í fíggjarviðurskiftum og fyri vøkstri í føroyska samfelagnum.**

Okkara grundleggjandi samfelagsábyrgd snýr seg um ígjøgnum fíggjarvirksemi, tryggingarvirksemi, pensjón og lívstryggingarvirksemi umframt húsamekling at tryggja javnvág millum vøkstur og støðufesti í føroyska samfelagnum og at fylgja altjóða og føroyskum lógum og leiðreglum á okkara virkisøki.

Hetta merkir ítøkiliga, at samfelagsábyrgdarlig atlit skulu havast í øllum okkara virksemi, bæði innanhýsis og uttanhýsis. Eitt nú í okkara íløguvirksemi, tænastuútboði, kundahandfaring og stuðulspolitikki eins væl og í okkara dagliga innanhýsis virksemi, herundir starvsfólkaviðurskiftum, orkunýtslu o.s.fr.

Betri samtakið hevur sett sær fyri at liva upp til leiðreglurnar hjá Sameindu Tjóðum fyri fyritøkur í sonevnda UN Global Compact.

CSR-politikkurin hjá Betri samtakinum fevnir um hesi øki:

- Mannaraættindi og arbeiðsmarknaðarviðurskifti
- Umhvørvi
- Íløguvirksemi
- Sosial viðurskifti og starvsfólkaviðurskifti

### CSR-lyftið

Fyri at liva upp til omanfyri nevndu mál binda vit okkum til at:

- Røkja okkara virksemi í samsvari við øll lógarkrøv á økinum
- Tryggja fult gjøgnumskygni í okkara virksemi
- Virka við ábyrgd og atliti at lokaløkjunum, har vit hava virksemi
- Regluliga at tryggja, at alt virksemi okkara livir upp til sett mál í okkara CSR-politikki
- Tryggja í tann mun, tað er gjørligt, at okkara samstarvspartar liva upp til somu krøv, sum vit seta okkum sjálvum

**CSR** er ein stytting fyri *Corporate Social Responsibility*. Hetta er eitt altjóða hugtak, ið verður nýtt til at umrøða samfelagsgagnliga virksemið hjá eini fyritøku ella stovni. Á føroyskum kalla vit tað stutt og greitt fyri *samfelagstilvitið.*



# Heimsmálini

Sameindu Tjóðir hava samtykt 17 heimsmál, sum skulu tryggja burðardygga menning í heiminum.

Liður í hesi altjóða samtykt er UN Global Contract, sum eru leiðreglur fyri fyritøkur, og samtyktin fevnir um mannarættindi, arbeiðsrættindi, umhvørvi og antikorruptión.

Betri vil liva upp til leiðreglurnar hjá Sameindu Tjóðum og hevur tí orðað ein CSR-politikk, sum fevnir um:

- Mannarættindi og arbeiðsmarknaðarviðurskifti
- Umhvørvi
- Íløguvirksemi
- Sosial viðurskifti og starvsfólkaviðurskifti

Í dagliga arbeiðnum verður arbeitt við at umseta Heimsmálini til ítøkilig innanhýsis- og uttanhýsis arbeiðsviðurskifti, og eisini skulu heimsmálini síggjast aftur í ítøkiligu tænastumenningini og marknaðarføringini hjá samtakinum.



HEIMSMÁL






# Betri hjálpti kundunum, tá korona kom

Tá ið koronufarsóttin rakti landið, setti Betri tiltøk í verk at minka um vandan fyri, at starvsfólk og kundar vórðu smittað, og tí vórðu fysisku avgreiðslurnar stongdar.

Allar tænastur vórðu í staðin veittar gjøgnum telefon, teldupost, tryggingarappina og netbankan. Fleiri starvsfólk vórðu sett í telefonavgreiðsluni, so kundarnir framhaldandi fingu avgreitt øll síni viðurskifti ómakaleyst.

Eisini vildi bankin tryggja, at kundarnir komu so væl fíggjarliga ígjøgnum koronukreppuna sum til bar. Bankin reageraði beinanvegin við hesum átøkunum:

### Privatkundar

- Privatkundar kundu fáa kostnaðarfrían rentu- og avdráttarskáa í upp til 6 mánaðir
- Bankin tók ikki gjald fyri skáar ella gjaldførislán í 6 mánaðir
- Rentulækkingar á bústaðarlánum og orkuvinarligum lánum vórðu framdar sum áður fráboðað (lækkaðar til ávikavist 2,75% og 2,25%)

### Vinnukundar

- Vinnukundar kundu fáa avdráttarskáa í upp til 6 mánaðir
- Smærri vinnukundar (vinnulig innlán minni enn 750.000 kr.) sluppu undan negativum innlánsrentum
- Fráboðaðu hækkingarnar á útlánsrentum til bæði privat- og vinnukundar vórðu útsettar í 6 mánaðir

### Heimurin steingir og nógvar avlýsingar

Nógvar uttanlandsferðir vórðu avlýstar í 2020. Betri Trygging hevði úr at gera við at vegleiða kundar um, hvussu tey skuldu bera seg at, tá ið uttanríkismálaráðini mæltu frá uttanlandsferðum, og ferðaveitarar avlýstu ferðirnar.

Betri Trygging longdi telefontíðirnar, og ein koronusíða varð gjørd, har kundarnir fingu svar á flest allar spurningar.

»Vit hava eina serliga skyldu at skapa tryggleika í Føroyum. Tí vilja vit sjálvsagt hjálpa kundum okkara ígjøgnum hesa kreppu, til hon er hæsað av.«

Jean Djurhuus, forstjóri Betri Banki

**Munandi fleiri skáar vórðu givnir í 2020 vegna korona**





# Bústaðarfígging: Vøkstur kring alt landið

**Betri Banki fíggjar bústaðir og bústaðarbygging kring allar Føroyar. Í 2020 var vøksturin í bústaðarlánum neyvt tann sami í Havnini sum uttanfyri Havnina. – Góð 6,6%**

Bústaðartrot var nógv frammi í miðlunum í 2020. Og ofta varð sagt, at tað er truplari at fáa fígging til bústaðir uttanfyri høvuðsstaðin. Hetta ger seg ikki galdandi hjá Betri Banka, har fíggingar á bygd og í Havn eru nærum tær somu.

Við árslok 2020 var 51% av samlaða talinum á bústaðarlánunum uttanfyri høvuðsstaðarøkið. Tað svarar til 44% av upphæddini av bústaðarlánunum hjá Betri Banka í 2020.

Hini 56% av samlaðu bústaðarlánunum eru latin í høvuðsstaðnum. At høvuðsstaðarøkið samanumtikið vigar meiri í samlaðu myndini var væntað, tí tað er munandi dýrari at keypa bústaðir í høvuðsstaðarøkinum.

### Lutfalsliga lítil skuld

Skuldin hjá føroyingum liggur somuleiðis á einum lágum stigi, um vit samanbera okkum við grannalondini. Yvirskipað hava føroyingar tí ikki stóra skuld. Skuldin hjá føroysku húsarhaldunum er 59% av bruttotjóðarinntøkuni, sum er væl minni enn í londum, vit vanliga samanbera okkum við.

Tað gongur sjón fyri søgn, at Betri veitir fígging og trygging um alt landið, tí Betri er fyri allar føroyingar. Hetta sampakkar væl við visjónina hjá Betri: Fremsta val føroyinga.

**Bústaðarlán 2020**
*Lutfall í krónum*




**Bústaðarlán 2020**
*Lutfall í tali av lánum*




Uttanfyri høvuðsstaðarøkið    Høvuðsstaðarøkið

HEIMSMÁL

12 ÁBYRGDARFULL NÝTSLA OG FRAMLEIÐSLA

13 VEÐURLAGSÁTØK

# Orkulán

**Í 2020 varð sjóneykan sett á at menna burðardyggar tænastur. Ein tænasta, ið nógv fokus var á, var orkulánið. Lánið verður veitt teimum, ið vilja gera orkugóðar ábøtur á bústaðin.**

Betri Banki hevur merkt, at vaksandi tal á kundum vil umvæla bústaðin, so hann gerst orkubetri og meira umhvørvisvinaligur. Betri hevur sett sær fyri at ganga á odda viðvíkjandi umhvørvisgóðum loysnum og veitingum, og tískil var upplagt at dagføra Orkulánið, sum er ein umhvørvisvinalig og kostnaðargóð lánsveiting. Betri Banki lækkaði rentuna niður í 1, 75% og kundarnir tóku væl ímóti hesum.

**Orkulán verður veitt teimum, ið vilja:**

- Skifta tak
- Bjálva bústaðin
- Skifta vindeygu
- Bjálva og klæða húsini av nýggjum
- Fáa sær nýggja ella alternativa orkuskipan
- Gera orkusparandi umbyggingar

Orkulánið hevur eina lægri rentu enn onnur lán, sum verða veitt til bústaðin.



# Sethúsatryggingin gjørdist umhvørvisvinalig

**Viðskiftafólk hjá Betri eru røsk at tryggja seg, men um skaði kemur fyri og skal umvælast, hugsa viðskiftafólkini ofta um at umvæla umhvørvisvinaligari. Hesum vil Betri stuðla.**

Betri merkir ein vaksandi eftirspurning eftir umhvørvisvinaligum tænastum. Viðskiftafólk eru meira og meira tilvitað um umhvørvisavbjóðingarnar og velja tí ofta veitarar og tænastur, sum eru umhvørvisvinaligar.

Tí hevur Betri Trygging tillagað sethúsatryggingina við einum umhvørvisvinaligum atliti. Vanligar sethúsatryggingar eru soleiðis snikkaðar, at kemur skaði fyri, verður skaðin bøttur. Men Betri vildi eggja kundunum til ikki bara at bøta um skaðar – men at betra um trygdina og umhvørvið í húsinum. Um totalskaði kemur fyri, dekkar sethúsatryggingin soleiðis, at skaðin verður betraður við umhvørvisvinaligum atliti.

Kundarnir hava tikið væl ímóti hesum, og væntast kann, at eftirspurningurin eftir umvørvisvinaligum tænastum veksur enn meira í komandi ári.



HEIMSMÁL

12 ÁBYRGDARFULL NÝTSLA OG FRAMLEIÐSLA

13 VEÐURLAGSÁTØK

# Grønt billán

**Eisini á billánsmarknaðinum varð 2020 eitt ár, har tænastumenningin gjørdist grønari. Fleiri og fleiri vilja keypa umhvørvisvinaligar bilar, og tí menti Betri Banki eitt billán við grønum ágóðum og fyrimunum.**

At keypa grønan bil kann hava fleiri fyrimunir. Fleiri teirra eru frítiknir fyri skrásetingar-, meirvirðis- og umhvørvisgjøld hjá tí almenna, og við grøna billáninum frá Betri Banka fekst eisini lægri renta tí í 2020 lækkaði Betri Banki rentuna niður í 1,75%. Sostatt kann tað loysa seg fíggjarliga at keypa umhvørvisvinaligar bilar.

Grøna billánið verður veitt teimum, ið keypa nýggjar bilar, so sum elbilar, hybridbilar og vetnisbilar.

### Grøn billán og orkusparandi ráðgeving

Betri Banki bjóðar kundum sínum grøn billán og orkulán til lægri rentu og hevur eisini eitt samstarv við Svend Krosstein og Demich um ókeypis orkusparandi vegleiðing.




HEIMSMÁL

3 GÓÐ HEILSA OG VÆLFERÐ

12 ÁBYRGDARFULL NÝTSLA OG FRAMLEIÐSLA

# Ferðast trygt í Føroyum

**Í 2020 broyttust umstøðurnar hjá viðskiftafólkunum, og ferðin til Mallorca varð broytt til tjaldingartúr við Leynavatn. Tí varð stórt kunningarátak gjørt, har góð ráð vórðu givin um, hvussu tú ferðast trygt í Føroyum, heldur enn at hava sjóneykuna á illveður og eld- og vatnskaðar, har fokus annars ofta hevur verið.**

Sølan av súkklum fleirfaldaðist, og summarhúsini á leiguheimasíðum vórðu útseld upp á mettíð. Tá ið tað gjørdist greitt, at føroyingar ikki kundu ferðast út í heim á sumri 2020, fóru teir at ferðast í egnum landi sum ongantíð áður.

Betri Trygging læt gera eina síðu, har føroyingar fingu góð ráð um, hvussu tú ferðast trygt í Føroyum, og samstundis vórðu mintir á týdningin av at fyrireika seg væl, áðrenn farið verður á ferð. Mælt varð til at hava eina vanlukkutrygging í viðførinum, tá ið ferðin byrjaði. Víst varð á, at tað er líka týdningarmikið at tryggja seg og síni eins væl og okkara hús, bil, lutir og so framvegis.

Eisini varð gjørt nógv burturúr at veita íblástur og góð hugskot til eina trygga ferð kring oyggjarnar.




Nøgdsemi við skaðaviðgerð

# Viðskiftafólkini eru nøgd

**Betri Trygging ger regluligar nøgdsemiskanningar millum privatu viðskiftafólkini. Serliga verður kannað, hvussu nøgd viðskiftafólk eru í sambandi við viðgerðina av skaðum. Staðfestast kann, at privatu viðskiftafólkini vóru nøgd við tænastuna í 2020.**

Tað kann tykjast løgið at spyrja, um viðskiftafólk eru nøgd við skaðaviðgerð. Men av tí, at fólk tekna sær tryggingar júst fyri at fáa hjálp, tá ið skaðin er hendur, er umráðandi at kanna, hvussu nøgd viðskiftafólkini eru við tænastuna. Síðan 2018 hevur nøgdsemið ligið á 80%, sum er eitt høgt stigatal.

– Vit arbeiða støðugt fyri at menna okkara tænastur og royna at læra av viðmerkingunum, sum vit fáa frá kundunum. Soleiðis læra vit viðskiftafólkini enn betur at kenna, og tað ger okkum aftur betur før fyri at styrkja um tænastuveitingarnar, sigur Ingunn Eiriksdóttir, forstjóri í Betri Trygging.

– Tað er altíð keðiligt, tá ið skaði hendir, men tá er tað umráðandi, at viðskiftafólkini kenna seg trygg og fáa ta hjálp, teimum tørvar, leggur hon afturat.

»Vit arbeiða støðugt fyri at menna okkara tænastur og royna at læra av viðmerkingunum, sum vit fáa frá kundunum.«

Ingunn Eiriksdóttir, forstjóri í Betri Trygging

**Nøgdsemi við skaðaviðgerð**



HEIMSMÁL

5 JAVNSTØÐA MILLUM KYN

8 SØMILIGT ARBEIÐI OG BÚSKAPARVØKSTUR

12 ÁBYRGDARFULL NÝTSLA OG FRAMLEIÐSLA

17 SAMSTARV UM HEIMSMÁLINI




**Betri Pensjón javnsetir kynini, tá ið umræður pensjónsútgjøld. Hetta varð samtykt í 2020 og sett í gildi 1. januar 2021.**

Nógv kjak hevur verið um javnstøðu í pensjónsmálum. Áður hava menn fingið størri útgjald, sum hevði sín uppruna í, at kvinnur liva 10% longur sum pensjonistar enn menn, og tískil fingu tær 10% lægri mánaðarligt útgjald; tó í eitt longri væntað tíðarskeið. Kjakið snúði seg um, hvørt tað er rímiligt at hava fyrilit fyri hesum muninum í livitíðini hjá kvinnum og monnum, tá ið útrokningin verður gjørd.

### Avgerðin er tikin

– Nú eru kynini javnsett. Lívrentur, sum komu í gildi frá 1. januar 2021, gera ikki mun á kyni, tá ið mánaðarliga útgjaldið verður ásett. Sosatt fáa kvinnur og menn sama útgjald, um teirra útgangsstøði væl at merkja er tað sama, sigur Helgi L. Petersen, Stjóri í Betri Pensjón. Hann fegnast um broytingina, sum tykist hava breiða undirtøku millum fólk, fakfeløg, myndugleikar og onnur.

Hetta sampakkar væl við heimsmálini sum Betri vil liva upp til.

»Sosatt fáa kvinnur og menn sama útgjald, um teirra útgangsstøði væl at merkja er tað sama.«

Helgi L. Petersen, Stjóri í Betri Pensjón

# Burðardyggar íløgur

**Betri Pensjón miðar eftir at fáa mest møguligt avkast fyri so avmarkaðan váða sum til ber. Eisini er tað ein týðandi liður í okkara íløguætlan, at okkara íløgur skulu gerast við burðardygd fyri eyga.**

Vit miða eftir, at okkara íløgur í partabrøv eru í feløgum, ið leggja dent á burðardygd. Í løtuni eru oman fyri 50% av okkara íløgum í partabrøv, sum hava burðardygd sum eyðkenni. Málið er støðugt at økja okkara part av burðardyggum íløgum og at koma upp á 100% um nøkur ár.

Betri Pensjón hevur samstarvsavtalu við íløgufelagið Sparinvest, sum tey seinastu seks árini hevur fingið toppkarakter frá Principles for Responsible Investment (PRI) fyri sína tilgongd til burðardyggar íløgur.

HEIMSMÁL







# Starvsfólk gjørdu Betri grønari

Á heysti 2019 fór Betri undir eitt innanhýsis átak fyri at fáa starvsfólk í samtakinum at taka lut í kjakinum um at fáa gjørt Betri grønari. Betri setti ein umhvørvisbólk saman við starvsfólkum úr øllum samtakinum. Ein hugskotskapping varð útskrivað, og inn kom hópur av hugskotum og tilmælum. Í 2020 vórðu hugskotini raðfest og sett í verk.

Tað hevur stóran týdning, at starvsfólk eru við í tilgongdini at gera samtakið umhvørvisvinaligari. Øll eru felags um at røkka málunum, og øll kenna eigaraskap í endamálinum, tí tey sjálv hava verið við at menna hesi hugskot.

Feløgini í Betri samtakinum fara áhaldandi at arbeiða við at gera Betri samtakið grønari. Tiltøk so sum at gera okkara bygningar grønari, stuðla undir grønum átøkum hjá kundum og gera tiltøk fyri starvsfólk okkara halda fram. Hetta gera vit fyri at varpa ljós á týdningin at verja okkara umhvørvi.



# Betri starvsfólkatrivnaður

Samanbera vit okkum við somu vinnur í Norðurlondum, trívast starvsfólkini væl í Betri samtakinum. Og hetta er umráðandi, tí at trivnaðurin hevur nógv at týða: trívast starvsfólkini, veita tey enn betri tænastu.

Trivnaðarkanningar verða gjørdar annaðhvørt ár. Tá fáa einstøku leiðararnir ítøkilig amboð at nýta fyri at styrkja um trivnaðin í deildunum. Kanningarnar verða umsettar til ítøkiligar tillagingar fyri at gera starvsfólk varug við tað, sum gongur væl. Tað snýr seg ikki um at finna ónøgd, men um at finna møguleikar.

### Trivnaður í frástøðu

Tá ið landið varð latið aftur, máttu nýggj stig takast, so kundarnir hjá Betri ikki skuldu merkja sviðan av afturlatingini. Starvsfólkini vórðu í stóran mun send til hús at arbeiða, og fundir og samskiftið við kundum gekk gjøgnum teldu og telefon.

Tað var ein avbjóðandi tíð, tí ongin hevði roynt hetta fyrr. Tað var umráðandi at halda trivnaðinum á einum høgum stigi, og tí varð sjóneykan sett á kunning. Frá HR-deildunum var málið at vera so greið og týðilig, sum til ber, so fólk kendu á sær, at samtakið hevði neyðuga yvirlitið, og at starvsfólkini vórðu stuðlað í hesum serligu tíðum.

Kundarnir høvdu nógvar spurningar og ivamál, tískil varð neyðugt at seta inn við fleiri fólkum og longdum telefontíðum fyri at lofta øllum spurningunum og ivamálunum. Men skjótt høvdu kundar og starvsfólk vant seg við nýggja veruleikan, og tað gjørdist lættari at avgreiða viðurskiftini við telduposti, teldusamrøðum ella við telefon.

Betri kannaði eisini, hvussu starvsfólk upplivdu afturlatingarnar, og sambært kanningini meta starvsfólk,



# Trivnaðarkanning 2020










at samtakið hevur kunnað væl og greitt um støðuna. Hetta hevur verið við til at halda trivnaðin uppi.

Trivnaður snýr seg um gerandisdagin. Tað snýr seg um, at starvsfólk skulu vita, hvat verður væntað av teimum, og tað snýr seg um, at tey skulu kenna á sær, at viðurskiftini eru í lagi. Og er starvsfólkatrivnaðurin í lagi, so eru fyritreytirnar at veita bestu tænastuna til staðar.

### Starvsfólkamenning

Fyri samtakið er tað umráðandi at tryggja, at starvsfólkini í Betri áhaldandi kunnu førleikamenna seg, og at felagið kann bjóða lærlingastørv. Førleikamenning økir um trivnaðin og tryggjar eisini framhaldandi kappingarføri.

## Lærlingar í samtakinum við árslok 2020

- Betri Trygging 4
- Betri Pensjón 1
- Betri Banki 16

HEIMSMÁL

5 JAVNSTØÐA MILLUM KYN

# Javnstøða í samtakinum

**Betri samtakið telur 288 starvsfólk, og vit miðja ímóti javnstøðu, bæði tá umræður kyn, aldur og at tey eru starvsett um alt landið.**

Í kanning hjá Javnaðarflokkinum á Fólkatingi varð staðfest: At hava ein kynsbýttan arbeiðsmarknað hevur við sær, at vinnugreinar og arbeiðspláss ikki fáa fullan ágóða av arbeiðsfjøldini.

Í Betri samtakinum verður arbeitt við at hava góða javnstøðuliga javnvág júst fyri at fáa fullan ágóða av øllum 288 starvsfólkunum, og tí at hetta skapar ein góðan dynamikk í samtakinum. Í dag vísir kynsbýtið í samtakinum eina yvirvág av kvinnum.

Í leiðandi størvum í samtakinum er ein lítil yvirvág av monnum.

Eisini er umráðandi at hava ein fjøltáttaðan starvsfólkabólk, tá ið umræður aldur. Sum lýst aðrastaðni í frágreiðingini er starvsfólkatrivnaðurin sera góður í samtakinum, og fólk eru vanliga leingi í starvi. 33% av starvsfólkunum eru millum 40 og 54 ár.

Betri setir næmingar á hvørjum ári, og í skrivandi løtu eru góð 7% av starvsfólkunum millum 20 og 24.

Betri miðjar eftir at fylgja heimsmálunum hjá ST, og tí fegnast vit um, at javnstøðan í samtakinum er góð.



### Aldursbýtið í samtakinum




### Kynsbýtið í samtakinum




### Kynsbýtið í leiðandi størvum í samtakinum




Menn
Kvinnur

# Umboðsráðsval 2020

**Á sumri í 2020 varð Umboðsráðsval, tá 18 limir skuldu veljast í ráðið. Umboðsráðið umboðar kundarnar, og áhugin var stórur bæði at stilla upp og at greiða atkvøðu til valið. Samanlagt er ráðið mannað við 35 limum, og val er á øðrum hvørjum árið, tá helvtin av ráðnum skal mannast av nýggjum.**

Áhugin at stilla upp til umboðsráðið var stórur. 37 fólk bjóðaðu seg fram, 22 menn og 15 kvinnur. 34% av kundunum greiddu atkvøðu, og er hetta ein betran av vallutøkuni mótvegis valinum í 2018, tá 28% luttóku.

Sum nakað nýtt var møguligt at greiða atkvøðu á netinum, um framt at greiða brævatkvøðu. Hetta hevur óivað verið við til at økja um valluttøkuna.

## Hvat ger umboðsráðið?

Uppgávan hjá Umboðsráðnum er at vera aðalfundur hjá Ognarfelag Tryggingartakaranna. Aðalfundurin velur m.a. nevndina í Ognarfelag Tryggingartakaranna, góðkennir ársroknskapin og ger møguliga viðtøkubroytingar. Harumframt kann Umboðsráðið gera av, at tað á hvørjum ári eisini verða hildnir aðrir regluligir umboðsrásfundir, har m.a. yvirskipað strategisk átøk verða umrødd.



# Betri Stuðulsgrunnurin læt góðar 15 mió. kr. í 2020

**Sambært virkisvirðunum hjá Betri skal fyritøkan virka samfelagnum at gagni. Hetta kemur til sjóndar millum annað í stuðulsavtalum.**

Í 2020 fingu 54 stuðulsumsóknir játtað stuðul úr Betri Stuðulsgrunninum. Samanlagt vórðu 15.339.715 kr. latnar í stuðli. Býtið á stuðlinum var soljóðandi:

- Tryggleika- og skaðafyribyrgjandi . . . 999.269 kr.
- Sjúkufyribyrgjandi . . . . . . . . . . . 12.836.324 kr.
- Mentan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 378.000 kr.
- Gransking . . . . . . . . . . . . . . . . . 1.126.122 kr.
- Í alt játtaðar í 2020 . . . . . . . . . . 15.339.715 kr.

Í 2020 vóru ikki minni enn 83,7% av játtanunum latnar til sjúkufyrbyrgjandi átøk. Orsøkin til hesa yvirvág er koronufarsóttin, sum rakti landið í 2020.

### Betri Stuðulsgrunnurin skapar tryggleika

3 ferðir um árið viðger nevndin í Betri Stuðulsgrunninum umsóknir, ið eru innkomnar. Stuðul verður fyrst og fremst latin virksemi, ið er:

- Skaðafyribyrgjandi
- Sjúkufyribyrgjandi
- Tryggleikaskapandi

Stuðul kann í ávísum førum eisini latast til annað samfelagsgagnligt virksemi, millum annað gransking og mentanarlig átøk. Ognarfelag Tryggingartakaranna stovnaði grunnin í 2016.

# Adventsgávur og stórfingin gáva til Sjúklingahotellið Tórshavn

**Jólaaftan fekk Sjúklingahotellið Tórshavn 300.000 kr. Hetta er stuðul frá Betri Stuðulsgrunninum, sum á hvørjum ári letur peningagávur til vælgerandi endamál.**

Betri Stuðulsgrunnurin lat eisini fíggjarligan stuðul til onnur, sum onkursvegna gera jólini betri fyri síni medmenniskju.

Hvønn sunnudag í advent lat grunnurin adventsgávur, sum vórðu avdúkaðar, tá lúka varð latin upp á betristudul.fo. Samanlagt lat Betri Stuðulsgrunnur 1.110.000 kr. í adventsgávum og jólagávum .

Endamálið hjá grunninum er at skapa tryggleika umvegis stuðul, sum í høvuðsheitum verður latin til virksemi, ið er skaðafyribyrgjandi, sjúkufyribyrgjandi og tryggleikaskapandi. Grunnurin veitir eisini stuðul til annað samfelagsgagnligt virksemi.

## Adventsgávurnar í 2020

| 1. sunnudagur í advent | 2. sunnudagur í advent | 3. sunnudagur í advent | 4. sunnudagur í advent |
|---|---|---|---|
| **Heilbrigdið**<br>kr. 150.000,- | **Parkinsonfelagið**<br>kr. 100.000,- | **Blindafelagið**<br>kr. 50.000,- | **Barnadeildin í Sjúkrahúsverkinum**<br>kr. 50.000,- |
| **City Church meals**<br>kr. 30.000,- | **Deyvafelagið**<br>kr. 50.000,- | **Autismufelagið**<br>kr. 50.000,- | **Umsorganarheimið Gloria**<br>kr. 50.000,- |
| **Herbergið**<br>kr. 30.000,- | **Barnaheimið**<br>kr. 50.000,- | **Berin**<br>kr. 50.000,- | **Krabbameins-felagið**<br>kr. 50.000,- |
| | | **Kvinnuhúsið**<br>kr. 50.000,- | **ADHD felagið**<br>kr. 50.000,- |

HEIMSMÁL

1 EINKI FÁTÆKADØMI

2 EINGIN HUNGUR

3 GÓÐ HEILSA OG VÆLFERÐ

16 FRIÐUR, RÆTTVÍSI OG STERKIR STOVNAR

HEIMSMÁL

3 GÓÐ HEILSA OG VÆLFERÐ




# Ein hjálpandi hond til sjúkrahúsverkið

**Betri samtakið læt 10 mió. kr. í bráðneyðugari hjálp til føroyska sjúkrahúsverkið. Stuðulin varð latin til útgerð at kanna og basa koronafarsóttini í Føroyum.**

– Hetta ger sera stóran mun hjá okkum, tí kostnaðurin av júst hesi útgerð er vaksin sera nógv, nú eftirspurningurin er øktur so brádliga um allan heim, segði Steinar Eirikstoft, forstjóri í sjúkrahúsverkinum .

– Vit eru sera takksom. Eg havi verið í sambandi við landsstýrismannin við heilsumálum, sum eisini vil senda eina hjartans tøkk.

Umframt fíggjarliga stuðulin til sjúkrahúsverkið vóru húsini, sum Betri Samtakið eigur, tøk hjá heilsumyndugleikunum, til at hýsa teimum, sum høvdu tørv á at fara í sóttarhald.

– Betri er eitt serføroyskt samtak, sum kundarnir eiga, ið hevur sum endamálsorðing at skapa tryggleika og vøkstur í Føroyum. Tí liggur tað okkum nær at stuðla í hesum tíðum, sum eru truplar fyri føroyska samfelagið, segði Evy Jacobsen, forstjóri í Betri, sum umsitur Betri Stuðulsgrunnin.

»Tað liggur okkum nær at stuðla í hesum tíðum, sum eru truplar fyri alt samfelagið.«

Evy Jacobsen, forstjóri í Betri

HEIMSMÁL

3 GÓÐ HEILSA OG VÆLFERÐ

11 BURÐARDYGGIR BYIR OG BYLINGAR

Parkinsonfelagið:

# – Nú fáa vit hugsavnað okkum um kunningina

**Tað sigur Durid Johannesen, forkvinna í Parkinsonfelagnum eftir at felagið fekk 100.000 kr. frá Betri.**

Parkinsonfelagið er eitt virkið felag, sum ger stórt, sjálvboðið arbeiði fyri limir og avvarðandi. Felagið skipar fyri fleiri tiltøkum og fyrilestrum fyri limir árliga, og á vetri í 2020 læt Betri Stuðulsgrunnurin Parkinsonfelagnum 100.000 kr. í stuðli. Grunnurin stuðlar virksemi, sum m.a. er sjúkufyribyrgjandi, og sostatt er stuðul til Parkinsonfelagið hóskandi til endamálið hjá Betri Stuðulsgrunninum.

– Peningurin fer til limarøkt á ymsan hátt. Vit royna at savna limirnar javnan, tí felagsskapurin er styrkjandi fyri okkum øll. Vit skipa fyri limafundum við undirhaldi, upplestri, fyrilestrum og eisini bara til prát, hugna og nærveru, segði Durid Johannesen, forkvinna.

– Okkara royndir læra okkum, at besta hjálp, vegleiðing og ráðgeving til fólk, sum liva við hesum avbjóðingum, er at tosa við onnur í somu støðu.

### Parkinsonfelagið á ferð

Annaðhvørt ár fer felagið á ferð kring Føroyar. Tað hevur týdning at koma út um landið, at hitta parkinson limirnar á teirra heimabeiti. Tað eru ofta tey somu, ið taka ábyrgd og gera tað stóra sjálvbodna arbeiðið, og vit royna ikki at troytta tey. Stuðulin hevur eisini havt týdning á hesi ferð, tí at vit hava kunnað keypt mat og tílíkt til at hugna um, og vit vita, at limirnir gleðast um hetta.

Durid hevur sitið í nevndini í Parkinsonfelagnum í 8 ár og hevur gjørt av at gevast í 2020.

– Eg fari at takka fyri meg. Betri Stuðulsgrunnurin skal hava stóra tøkk frá Parkinson Felagnum, tí nú eru fíggjarligu viðurskiftini í einari góðari legu, so nýggja nevndin kann hugsavna seg um at skipa fyri viðkomandi tiltøkum og at kunna um parkinson.

## Fakta

- Felagið varð stovnað í 1990
- Parkinsonfelagið hevur 130 limir
- Í Føroyum hava 120 fólk parkinson







## Betri stuðlar Reyða Krossi

Kjarnuvirksemið hjá Reyða krossi er at skapa tryggleika, og tað samsvarar væl við endamálið hjá Betri Stuðulsgrunninum. Hartil er tað samfelagsgagnligt virksemi kring alt landið.

# Stóra innsavningin til Reyða Kross

**Sunnukvøldið 15. november 2020 var stór landsinnsavning hjá Reyða Krossi. Landsinnsavningin varð skipað sum ein sjónvarpssending, tí at ikki var gjørligt at ganga hús úr húsi við eyðkendu bússunum í koronutíð.**

Heilar 3.418.020 krónur vórðu latnar í stuðli til Reyða Kross, og Betri Stuðulsgrunnurin læt 250.000 kr. Stuðulin var markaður til tað virksemið, sum Reyði krossur hevur í Føroyum. Evy Jacobsen, forstjóri, varð boðin í sjónvarpshølini.

– Reyði Krossur er heimsins størsti hjálparfelagsskapur. Ferð eftir ferð hevur Reyði Krossur víst sítt stóra virði í Føroyum. Í vár fingu vit øll ein hvøkk. Ein farsótt legði landið lamið og broytti allar vanligar spælireglur.

– Meðan óvissan valdaði, steig Reyði Krossur fram og beyð sær til at hjálpa teimum, ið tørvaðu hjálp. Tí soleiðis er Reyði Krossur – tey stíga fram, tá ið tørvur er. Hetta sampakkar væl við endamálið hjá Betri Stuðulsgrunninum. Tí er tað púra natúrligt, at stuðul verður latin Reyða Krossi, greiddi Evy Jacobsen frá.






HEIMSMÁL




# Høvuðsstuðul hjá samarittunum

**Samarittarnir hjá Reyða Krossi eru við á flestu stevnum, festivalum og øðrum tiltøkum kring landið. Teirra leiklutur er at skapa tryggleika.**

Betri stuðlar samarittunum, og avtalan er galdandi frá 2019 til 2022. Sjálvboðin í samaritt-tænastuni hava góða útbúgving í likamligari og sálarligari fyrstuhjálp og arbeiða við at veita fyrstuhjálp til alt frá smásnuddum til størri skaðatilburðir og at geva professionell boð víðari til eitt nú sjúkrabil og løgregluna.

Harumframt stuðlar Betri Stuðulsgrunnurin Reyða Krossi við 200.000 krónum til at skipa fyri einari týðandi váðakanning í Føroyum út frá altjóða leisti, sum skal lýsa, hvørjir váðar eru í Føroyum í dag, og hvat kann væntast í framtíðini. Hendan vitan skal brúkast til at eyðmerkja vandar og harvið fyribyrgja og skipa tilbúgving.







# Bjargingarvestar til tjóðarítróttina

**Í 2020 læt Betri Stuðulsgrunnurin 363.894 kr. til Róðrarsamband Føroya. Peningurin varð nýttur til at veita øllum íðkandi bjargingarvestar, sum bæði lúka øll neyðug krøv og eru góðir at íðka í.**



Róðrarsamband Føroya setur trygdina í hásæti, tá ið farið verður út á sjógv at rógva. Børn, ung og vaksin rógva kapp, og Betri vildi stuðla teimum íðkandi, so tey kunnu mennast á besta og tryggasta hátt. Peningurin, ið varð játtaður, var markaður til at veita øllum teimum íðkandi góðar, tryggar og smidligar bjargingarvestar, tí tryggleiki er fyritreyt fyri at kunna íðka og gerast betri.

»At vit hava møguleika at rógva og at vera trygg á sjónum kann vera við til, at fleiri ung velja at rógva kapp í Føroyum.«

Sverri Sandberg Nielsen, evropiskur meistari í rógving, í samrøðu við Betri.

HEIMSMÁL

11 BURDARDYGGIR BYIR OG BYLINGAR

# Betri stuðlar fótbóltinum kring landið

**Betri er høvuðsstuðul hjá fremstu fótbóltsdeildunum í Føroyum og er somuleiðis høvuðsstuðul hjá føroyska kvinnulandsliðnum í fótbólti. Talan er um eina stóra menningaravtalu millum FSF og Betri, sum er galdandi til og við 2022.**

Betri virkar í og kring allar Føroyar. Fótbólturin er ógvuliga væl umtókt ítrótt, sum bæði í breidd og við góðum úrslitum í altjóða høpi skapar úrslit. Tískil passar hetta væl saman við okkara virðum at gera eina longri menningaravtalu, sum snýr seg um allan føroyskan fótbólt.

»FSF hevur lagt eina greiða og miðvísa ætlan fyri at fáa fleiri at spæla fótbólt.«

Christian Andreasen

– Størsta ótroytta tilfeingið eru kvinnur, og tað fara vit støðugt at leggja dent á at venja. Ein partur er at gera kvinnulandslið og Betri deildina hjá kvinnum sjónlig, segði Christian Andreasen, forseti í Fótbóltssambandi Føroya.

Menningaravtalan tryggjar eina árliga stuðulsupphædd til liðini í Betri deildunum hjá bæði kvinnum og monnum, harumframt fáa eisini hini feløgini við skipaðum ungdómsarbeiði eina árliga upphædd.












# Fólkaskúlakapping um burðardygd

**Í samstarvi við Føroya Lærarafelag handar Betri árliga fólkaskúlum eina veðurlagsvirðisløn. Fólkaskúlar og frískúlar, sum hava virkað fyri burðardygd og arbeitt við veðurlagsavbjóðingum, kunnu luttaka í kappingini um veðurlagsvirðisløn Føroya Lærarafelags.**

Virðislønin verður latin skúla, ið hevur skarað framúr at geva børnum og ungum áhuga fyri og innlit í veðurlagsavbjóðingar. Lærarafelagið vil, at føroyski skúlin í størri mun eggjar børnum og ungum at arbeiða við veðurlags- og umhvørvisavbjóðingum, so at børn og ung fáa øktan áhuga fyri at finna loysnir.

Tey ungu skulu gerast tilvitað um, at tað, at reka vinnuligt virksemi hevur altíð ávirkan á umhvørvið. Tí fylgir ein ábyrgd við hesum. Umhvørvi og burðardygd eru evni, sum í alt størri mun hava týdning fyri føroyska samfelagið og kundarnar hjá okkum, og tí skal Betri eisini taka ábyrgd á hesum øki. At vera burðardygg og ábyrgdarfull hóskar sera væl til virðisgrundarlagið í Betri. Betri stuðlaði átakinum við 25.000 kr.

Í 2020 varð veðurlagsvirðislønin latin Eysturskúlanum.

VEÐURLAGSVIRÐISLØN
FØROYA LÆRARAFELAGS






# Renn fyri lívi

**Renn fyri lívi er ein skipan, ið kann bjarga lívi. Tað snýr seg um at fáa hjartastartara á vanlukkustaðið sum skjótast, tí at møguleikin at bjarga lívi er størstur, tá ið skjótt verður borið at. Betri stuðlaði verkætlanini við 200.000 kr.**

Renn fyri lívi er eitt samspæl millum myndugleikar og neyðhjálparar. Skipanin tryggjar, at nærmastu hjartastartarar koma á vanlukkustaðið sum skjótast, við at neyðhjálparfólk renna eftir útgerðini.

Betri hevur seinastu árini latið 35 hjartastartarar til vøllir og hallir um alt landið.

Skipanin hevur longu prógvað sítt virði og hevur verið við til at tryggja persóni lívsneyðuga hjálp, sum hevur verið úti fyri hjartasteðgi.

Endamálið hjá Betri Stuðulsgrunninum er at veita tryggleika, og stuðul verður latin virksemi, sum er skaðafyribyrgjandi, sjúkufyribyrgjandi og tryggleikaskapandi. Renn fyri lívi hóskar væl í hesar virksemisbólkar, og tí var tað natúrligt hjá Betri Stuðulsgrunninum at lata stuðul til endamálið.

# Føroysk gransking í miðdepilin

**Ein partur av virkseminum hjá Betri Stuðulsgrunninum er at stuðla granskingarverkætlanum. Í hesum føri hevur dentur verið lagdur á, at granskingarúrslitini skulu gagna føroyska almenninginum, og at onnur enn Betri Stuðulsgrunnurin hava latið ein part av fíggingini.**

Í 2020 varð á leið 1. mió. kr. latin fimm granskingarverkætlanum. Verkætlanirnar, sum fingu stuðul, eru hesar:

- Gransking í tarmsjúkum í Føroyum, Turið Hammer, lækni, Ph.D.
- Gransking í ílegum, sum elva til bróstkrabba, Noomi Ó. Gregersen, Ph.D. í mýlskari lívfrøði
- Gransking í jodvirði hjá barnakonum í Føroyum, Anna Sofía Weihe, ljósmóðir, Master í Public Health
- Gransking í, hvørja ávirkan langtíðarvenjing hevur á hjartaæðrasjúkur, Jacobina Kristiansen, lækni og Ph.D.-lesandi
- Gransking í umstøðum at ala á sjógvi, Jóhanna Lava Køtlum, lívfrøðingur, MSc, Fiskaaling

HEIMSMÁL

3 GÓÐ HEILSA OG VÆLFERÐ




# Betri Ferðslutrygd

**Betri Trygging er ein av hollu stuðlunum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Stuðulin tryggjar tiltøk, átøk og undirvísing.**

Tá ið Ráðið fyri Ferðslutrygd varð stovnað í 1976, var Betri Trygging (tá Tryggingarsambandið) stigtakari saman við 13 ymsum stovnum og fyritøkum. Og longu frá byrjan var felagið ein av stóru stuðlunum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sum við peningaligum stuðli gjørdi, at RFF kundi fremja sítt virksemi.

Stuðulin verður veittur beinleiðis til átøk og tiltøk hjá Ráðnum. T.v.s. at onki av stuðlinum fer til rakstur av RFF, men allur stuðulin verður beinleiðis nýttur til ferðsluátøk og -undirvísing. Umframt peningaliga stuðulin er eisini samskifti og sparringin við marknaðardeildina hjá Betri ein týðandi partur av mátanum, vit skapa og fremja tiltøkini. Soleiðis verða aktuellu ferðslutrygdaravbjóðingarnar knýttar tætt at fakligheitini í marknaðardeildini, og hetta samstarvið virkar framúr.

Dømi um átøk hjá RFF, sum Betri stuðlar – einsamalt og saman við øðrum – eru millum annað átøk um ov nógva ferð, rúskoyring, gáloysni, undirvísingartilfar í ferðslu til fólkaskúlan, undirvísing í ferðslu fyri landsins 8. flokkum í meiri enn 20 ár og ókeypis súkkluhjálm til øll børn, tá ið tey byrja í 1. flokki.







betri

## **Betri** samfelagstilvit

Betri er eitt ábyrgdarfult samtak. Vit stremba eftir skynsemi, burðardygd og trivnaði í gerandisdegnum. Somuleiðis vil samtakið liva upp til Heimsmálini, og hetta sæst aftur í okkara virksemi. Í frágreiðingini stendur at lesa, hvørji ítøkilig tiltøk vórðu sett í verk í 2020.
Vit taka stór fet. Vit taka smá fet. Fram kemur hann, ið hóvliga fer.

betri

**Betri P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 000
betri@betri.fo
www.betri.fo